













ár. Við eini stórari portión av ironi tekur stykkið støði í einum ungum pari, sum berjist móti teim heteronormativu krøvunum samfelagið setur í mun til tey sálarligu krøvini og frágreiðingar um, hvussu vit gerast eydnusamir einstaklingar. Parið avger at fara í parterapi, sum hevur við sær bæði persónligar kreppur og eksistentiellar trupulleikar.

Onki flaggdagshald uttan flaggdagsrøðu. Røðari var Óli Breckmann, ið kl. 24.00 m. a. røddi um søguna hjá Merkinum, um framgongdina og vælferðina í vesturheiminum og í Føroyum. Hann setti at enda spurnartekin við, hvar vit eru ávegis, nú Merkið fyllir 70 ár? Eftir røðuna spældu Hans Petur í Brekkunum og Niklas Mouritsen undir, meðan fjøldin treiv í »Sjá tú blánar«.

Tónleikaligu innsløgini vóru fimm í tali:

Knút Eysturstein Háberg, Andreas Valdivia, Katrina Petersen, Jákup á Lakjuni, Jógvan Óli Ellingsgaard og Fróði Hansen við bólki. Bólkurin hjá Fróða var mannaður av Sveini Dam, guitar, Mattias Kapnas, keys, Rúni Mouritsen trummur og Jan Jensen, bass. Fróði Hansen sang, spældi munnharmoniku og guitar.

Bólkurin spældi eftir røðuna kl. 00.30 og endaði hervið øðrvísa flaggdagshaldið í Føroyahúsinum. Við teirra gjøgnumgangandi harða melidiøsa rocktónleiki var hetta ein góður máti at enda eitt tiltak, ið hevði lagt upp til at umfata eitt sindur av hvørjum, og hervið vísa á ein part av tí nógva virkseminum, ið er millum føroyskar útisetar í Keypmannahavn. Tey tónleikaligu innsløgini, ið høvdu verið áðrenn, vóru fyrst og fremst einkultpersónar, ið framførdu við gutara og sangi. Í Katrinusa føri, við klaveri og sangi, sum hugtók áhoyraran við sínum innarligu og vøkru løgum og sangi, sum eru at finna á fløgu hennara, Coulouress Day, frá 2009.

Andreas Valdivia hevði ein trummuspælara, Jaques, við sær. Teir spældu egin løg, undir heitinum, Villa. Teir spældu new-folk tónleik, og bólkurin var hervið eitt gott mótspæl til restina av tónleikinum, ið annars var á skránni.

Ágrýtni og virkni tónleikarin, Jákup á Lakjuni, hevði eina áhugaverda introduktión til sína fínu og livandi tónleikaframførslu, sum gerst betur og betur fyri hvørja ferð ein hoyrir hann spæla. Hann byrjaði við at lesa ein tekst, sum hann hevði skrivað út frá einum dreymi, hann kallaði livandi málningur. Hetta var gott, tí um nakað hevði vantað hetta kvøldið, var tað upplestur av upprunatilfari.

Havnarmaðurin Jógvan Óli Ellingsgaard, er eitt føroyskt boð upp á ein sannan rocksangara. Ikki minst er hann eitt livandi dømi um, hvussu ein upp á 20 min. við smáum anekdotum, charmu, eini smittandi lívsgleði og einum fantastiskum sangtalenti og guitarførleika, kann fáa einhvønn at dáma Alice in Chains og eisini hansara egnu løg og sangir, ið vóru í sama stíli sum áðurnevndi bólkur.

Knút útgav sína næstu fløgu, The Desert Hold A Flower í fjør. Tónleikurin tekur støði í m. a. alskyns psykodeliskum tingum. Sjálvur sigur Knút um tónleikin, at hann er psykodeliskur gospel poppur við einum 70´ara shoegazara rock ´n` roll vibe omaná. – Hetta kvøldið spældi hann egin løg frá fløguni í rúmklangs solo útgávum á sín trúgva, meksikanska telecastara.

Tá Fróði Hansen við bólki var liðugur at spæla umleið kl. 02, var samstundis sett punktum fyri eitt kvøld, sum var eitt prógv um, at føroyski mentanarpallurin er ótrúliga fjølbroyttur, áhugaverdur og ríkur í ein mun, sum lutfallsliga hevði verið førur fyri at yvirhálað eitthvørt annað land í heiminum. – Gamla Merkið hevur alla orsøk til at vera stolt av sínum børnum, bæði heima og úti. Eingin ivi um tað.



Elna Høgenni og John A. Poulsen HOYVÍK


Eyðbjørg E. Antoniussen og Óli Nolsøe ARGIR


Matilda Sivertsen og Lucas B. Ceni TÓRSHAVN


Siri Johnsdóttir og Martin Mohr í Grund EIÐI/GØTA


Barbara Nielsen og Kim Roest TRONGISVÁGUR

Øll, sum atkvøða fyri vinnaraparinum eru við í lutakastinum um eitt gávukort frá SMS á kr. 1.000,-

sms

vinn eitt brúdleyp ATKVØÐUSEÐIL

Fyll seðilin út og set ein kross í fýrkantin við tað parið, sum skal vinna eitt brúdleyp fyri uml. kr. 38.000,-

Navn innsendarans: Telefon nr.:

Ein atkvøðuseðil verður í Sosialinum hvønn dag til og við týsdagin 11. mai 2010. Ikki er loyvt at margfalda seðilin!

- Klipp beinleiðis úr blaðnum og send til:

**Sosialurin,** att: Brúdleypskapping, Postboks, 110 Tórshavn

Sosialurin

Sosialurin 341800